## Frem trý stig í Jyllandi

Lagið var gott á Atla Danielsen og liðfeløgunum í Frem, tá ið teir í gjárkvøldið komu aftur í Valby í Keypmannahavn. Frem spældi tíðliga seinnapartin í Thisted, og Frem sigraði 2-0. Hetta var fyrsta ferðin í hálvt annað ár, at tað eydnaðist Frem at fáa fulla úrtøku í Jyllandi. Lítið bendi leingi á, at Frem skuldi fáa fulla úrtøku. Talan var um málleysan javnleik, inntil tað restaðu fimm minuttir, og heimaliðið hevði havt teir størstu møguleikarnar. Fimm minuttir fyri leiklok skoraði Frem, og í yvirtíðini øktu teir til 2-0. Stutt eftir fyrra málið hevði Atli Danielsen ein góðan møguleika, men bólturin streyk skeivu megin stólpan.



## Dynamo Kiev vann

Í gjár eydnaðist ukrainska stórfelagnum, Dynamo Kiev, at vinna meistaraheitið, tá teir vunnu ein tryggan 3-1 sigur á Karpaty Lviv. Undan seinasta dystinum eru teir sostatt seks stig frammanfyri Shaktar Donetsk á øðrum plássi, sum hevur vunnið meistaraheitið seinastu tvey árini. Fyrr í ár eydnaðist eisini liðnum úr Kiev at vinna steypakappingina, og við hesum hava teir nú tryggjað sær "the double." Hetta er 12. meistaraheitið hjá Dynamo Kiev í ukrainskum fótbólti, meðan teir harafturat hava vunnið 13 meistaraheitið í gamla Sovjetsamveldinum í árunum 1961 til 1991.

# Guds hond var ikki nóg mikið

**Real Madrid eru sera tætt við at vinna meistaraheitið í Spania, hóast tað eina løtu sá út, til at eitt Messi mál, ið varð skorað við hondini, kundi gerast avgerðandi fyri spanska meistaraheitið**

FÓTBÓLTUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Lionel Messi úr Barcelona skúgvaði við hondini undir bóltin, ið fór uppum málmannin hjá Espanyol*
*Mynd: Polfoto/AP*

Tey trý sponsku oddaliðini spældu samstundis leygarkvøldið. Áðrenn hetta, tað næst seinasta umfarið, vóru Real Madrid og Barcelona jøvn á stigum við 72 stigum hvør, meðan Sevilla hevði 71 stig.

Talan var um 90 spennandi minuttir, har fjepparar hjá Barcelona, Real Madrid og Sevilla skiftu millum ovfarakæti og vónbrot. Barcelona var fyrsta liðið at fara afturum, og hetta gleddust fjepparanir hjá Real Madrid um. Heilt til Zargoza við einum brotssparki legði seg framum Real Madrid. Tá Messi beint eftir javnaði fyri Barcelona við einum málið, har hann við hondini skúgvaði bóltin upp um málmannin, var lagið ringt hjá Real fjepparunum. Málið fekk tankarnar at leita til landsmannin hjá Messi, ið hann so ofta er sammettur við, Diego Maradona, og hansara víðagitna "Guds hond" mál.

Messi skeyt stutt eftir enn eitt mál - hesaferð við beininum, og hóast Real Madrid fekk javnað, so gekk ikki long løta fyrr enn Zargoza aftur legði seg framum. Til fáir minuttir vóru eftir var støðan tann, at Barcelona var frammanfyri 2-1 og Real Madrid var aftanfyri 1-2. Í seinasta minuttin javnaði Ruud Van Nistleroy fyri Real Madrid, og samstundis skeyt Raul Tamudo mál fyri Espanyol móti Barcelona, so støðan í báðum dystum gjørdist 2-2. Samstundis megnaði eitt skert Sevilla lið einans at fáa málleysan javnleik móti Mallorca. Tí er støðan tann við bert einum umfari eftir, at Real Madrid og Barcelona eru jøvn á 73 stigum, men Real Madrid hevur vunnið innanhýsis dystirnar og gerst sostatt meistari, um liðini eru jøvn á stigum. Sevilla hevur 72 stig.

Í seinasta umfarinum møtast Sevilla og Barcelona, meðan Real Madrid hevur vitjan av Mallorca. Tí er møguleikin góður fyri, at Real Madrid verður spanskur meistari í ár.

# Eingin steðgar toftamonnum

**Í Sandavági ætla teir sum skjótast at gloyma avsmurningin ímóti oddaliðnum og heldur fokusera upp á næstu avbjóðingina og at verja næstfremsta plássið, sum tað framvegis tykist vera lítil kapping um**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í dýrdarveðrinum á Valloyrini í Sandavági leygardagin tóku toftamenn enn eitt risa fet ímóti Formula deildini. B68 flongdi FSV04 við ikki minni enn 6-1. Heimaliðið fekk ikki sítt mál fyrrenn í evstu løtu, tá ið toppskjúttin, Andrzej Stretowicz, umsetti brotsspark til mál aftanfyri Gunnar á Steig, sum annars hevði millum lítið og einki at gera.

B68 setti beinanvegin ikki serliga sannførandi heimaverjuna undir trýst. Eftir skjótálop og innlegg frá Kristian Anton Andreasen skoraði Jósup Henriksen til 1-0, og ágrýtni maðurin økti í síðstu løtu til 2-0, tá ið hann kom ímillum afturlegging.

Venjararnar báðir hjá FSV04, Jan C. Dam og Jákup Eli Olsen, komu ikki á vøllin eftir steðgin. Besta møguleikan hjá FSV04 í 1. hálvleiki hevði toppskjúttin, Andrzej Stretowicz havt, men hann var óheppin og sendi í tvørtræið.

Eftir steðgin bar einki til hjá heimaliðnum, og B68 hevði fult tamarhald á. Miðvallarin Jann Ingi Petersen skoraði tvær ferðir, og vongverjin Alex Troleis og miðvallarin Alexandro Casthilio eina ferð í part.

B68 er trettan stig frammanfyri triðja plássið og á veg upp í Formula deildina. FSV04 droymir eisini um Formula fótbólt. Tað kann gott vera, at teir fara at gera dreymin til veruleika, tá ið teir hava gloymt leygardagin.

### Dystur um bronsuna

TB fekk fult, tá ið teir høvdu vitjan av LÍF og telvaðust um fjórða plássið. LÍF var væl við undan hvíldini, men leirvíkingar megnaðu ikki at skjóta mál. Tíðliga í 2. hálvleiki skoraði Olivur Abrahamsen, og bara lítla løtu seinni varð alt avgjørt, tá ið TB toppskjúttin, Kaj Roest, hevði økt um munin.

So var TB meiri verjukent, men LÍF megnaði ikki at hótta.

NSÍ plagar at hava ilt við at halda tørn um plássið í næstbestu deildini, tá ið teir áður hava roynt seg. Hesa ferð tykist fara at bragda. Eftir sigurin á botnliðnum, B36, í Gundadali er NSÍ langt frá niðurflytingarstrikuni.

Eddie Mikkelsen skoraði einsamalla málið í 1. hálvleiki. Eftir stutta frísparkssending smekkaði hann til úr stórari fjarstøðu. Málverjin tóktist hava tak á, men bólturin fór í málið. Eftir uppspæl í vinstru økti Sonni L. Petersen til 2-0.

B36 liðið var ikki væl mannað. Kurt Mørkøre stóð í álopinum, og tað eydnaðist honum at minka um munin, tá ið tað restaðu fimm minuttir. Gamli málrevurin var fyrstur á returbólti.

Tað eydnaðist hvørki KÍ ella SÍ koma sær undan hóttanini av niðurflyting. Í tættari uppgerð í Klaksvík legði Poul Poulsen SÍ framum. Fram ímóti steðginum fótaði heimaliðið sær, og teir skoraðu tvey mál. Kristian Andreasen við brotssparki og Julian Samuelsen, sum leingi hevur verið skaddur, og nú tykist vera um at koma fyri seg aftur, áttu málini. Julian við at seta krúllin undir frísparksinnlegg.

SÍ royndi at leggja trýst á eftir steðgin. Útjavnandi málið skoraði Jørgen Meitilberg, tá ið hann gjørdist leysur.

Í Gundadali skuldu HB og ÍF havt spælt. Fuglfirðingar hildu seg hava fingið boð um at spæla klokkan 15, og teir fóru til hús aftur, tá ið heimaliðið ikki møtti. HB liðið møtti at spæla klokkan 17, og tað hildu teir seg hava givið ÍF boð um. Enn er ikki avrátt, hvat verður av hesum dystinum.

## FAKTA UM 1. DEILD

**TB-LÍF 2-0 (0-0)**
1-0: Olivur Abrahamsen 51.
2-0: Kaj Roest 60.

**HB-ÍF ikki spældur**

FSV04-B68 1-6 (0-2)
0-1: Jósup Henriksen 7.
0-2: Jósup Henriksen 45.
0-3: Jann Ingi Petersen 49.
0-4: Alex Troleis 56.
0-5: Alexander Castilho 68.
0-6: Jann Ingi Petersen 83.
1-6: Andrzej Stretowicz br 90.

**B36-NSÍ 1-2 (0-1)**
0-1: Eddie Mikkelsen 38.
0-2: Sonni L. Petersen 69.
1-2: Kurt Mørkøre 85.

**KÍ-SÍ 2-2 (2-1)**
0-1: Poul Poulsen
1-1: Kristian Andreasen br
2-1: Julian Samuelsen
2-2: Jørgen Meitilberg